# Nú skal Jens vísa hvat hann dugir

*Fríggjadagin skal Jens Stoltenberg fyri fyrstu fer seta seg í forsætisráðharrastólin í Noregi. Hann hevur leingi verið ein av best umtóktu politikarunum í Noregi*

Jógvan Hugo Gardar, Oslo

Hósdagin í farnu viku kom endiliga dagurin, sum Gro Harlem Brundtland leingi hevur bíðað eftir. Støðan í Stórtinginum letur upp dyrnar fyri, at Jens Stoltenberg endiliga kann gerast forsætisráðharri í Noregi.

Gro Harlem Brundtland ynskti, at Jens Stoltenberg skuldi gerast floksleiðari í Arbeiðaraflokkinum, tá hon fór frá á heysti 1992. Men norska arbeiðararørslan við LO-leiðaranum Yngve Hågensen á odda, høvdu ikki álit á tí unga Stoltenberg. Ístaðin fekk Hågensen syrgt fyri, at stuðulin og vinmaðurin, Thorbjørn Jagland, gjørdist flokksleiðari. Søguliga hevur floksleiðari eisini verði floksins boð uppá ein forsætisráðharra.

Bondini millum Jagland og Hågensen hava í mong ár verið tøtt og eru tað framvegis. Tað er nokk eisini orsøkin til at Thorbjørn Jagland ikki hevur latið Stoltenberg yvirtaka floksleiðarastarvi. Teir báðir skulu nú stýra flokkinum.

Stoltenberg verður anlitið úteftir, meðan Jagland skal byggja upp flokkin, og vera tann, sum vitjar lokalfeløgini.

Hetta samstarvið millum teir báðar hevur longu sett spurnartekin við, hvør í veruleikanum stýrir í flokkinum. Stuðulsfólk hjá Jens Stoltenberg óttast, at hann verður brúktur fyri at syrgja fyri, at Arbeiðaraflokkurin skal sleppa framat maktini, men at tað í veruleikanum verður Thorbjørn Jagland og LO, ið hava seinasta orðið.

Hetta er eisini nakað, Thorbjørn Jagland hevur sagt meir og minni týðuligt. Av røttum hevur Jagland lagt dent á, at Stoltenberg hevur seinasta orðið í komandi stjórnini, men at hann sjálvur hevur seinasta orðið í aðalstjórn floksins. Í hesum liggur at Jagland hevur seinast orð, tí søguliga er tað aðalstjórn floksins sum avgerð, hvat floksins tinglimir og stjórnarlimir skulu meina og gera.



*Gassorkumálið, sum fekk Stoltenberg fram, fer at fylgja honum langa tíð. Jens Stoltenberg fer at stinka av gassi í mong ár framyvir. Og tað setir síni krøv til ein, ið verð kendur sum ein grønur politikkari, meta eygleiðarar*

# Í fótasporum faðirsins



*Komandi norski forsætisráðharrin, Jens Stoltenberg, er sonur fyrrverandi uttanríkisráðharran og Balkansemingsmannin, Thorvald Stoltenberg*

Jógvan Hugo Gardar, Oslo

Jens Stoltenberg hevur í nógv ár veið mettur sum ein sjálvskrivaður oddamaður fyri flokkin. Hann hevur verið virkin í floksarbeiðinum síðani hann var heilt ungur. Og hóast hann hevur verið sera sjónligur í flokkinum í meir enn 20 ár, so er hann ikki meir enn 40 ára gamal – gerst 41 ár í morgin hósdagin tann 16. mars.

Í fleiri ár varð hann nevndur sum møguligur ráðharri, men hann slapp ikki framat fyrrenn pápin, Thorvald Stoltenberg, fór frá sum uttanríkisrádharri. Norska lóggávan forðar fyri, at faðir og sonur sita sum ráðharrar í somu stjórn. Thorvald Stoltenberg sat sum verjumálaráðharri í stjórnini hjá Oddvar Nordli 1979-1980, og í fyrstu stjórnini hjá Gro Harlem Brundtland í 1981. Hann kom so aftur sum uttanríkisráðharri í teimum báðum stjórnunum, sum Gro Harlem Brundtland skipaði í 1987-89 og 1990-93. Thorvald Stoltenberg fór tá í starv sum friðarmeklari í gamla Jugoslavia.

Jens Stoltenberg byrjaði sítt virki í ríkispolitikkinum sum varalimur til Stórtingið 1989-93. Hann bleiv fastur tinglimur í 1991, tá Bjørn Tore Godal fekk ráðharrasess.

Árið frammanundan var hann skrivari hjá norska umhvørvismálaráðharranum. Aftaná valið í 1993 fekk Jens Stoltenberg sessin sum ídnaðar- og umhvørvismálaráðharri. Hendan sessin hevði hann fram til Gro Harlem Brundtland fór frá sum stjórnarleiðari í oktober 1996. Tá tók Thorbjørn Jagland við, og Jens Stoltenberg fekk tann týðandi sessin sum fíggjarmálaráðharri.

Tá miðflokkarnir tóku yvir í oktober 1997, og Kjell Magne Bondevik gjørdist forsætismálaráðharri, fór Stoltenberg aftur í Stórtingið, har hann fram til februar í sat sum formaður í orku- og umhvørvisnevndini. Hesar seinastu vikurnar hevur hann staðið á odda fyri tingbólkinum hjá Arbeiðaraflokkinum.

# KT-síðurnar í Sosialinum

*Í morgin fer Sosialurin undir nýggjan tátt. Tá koma fyrstu KT-síðurnar í blaðið og tær verða fastur táttur í blaðnum hvønn hósdag*





*Finn Jensen og Steinbjørn í Dali fara at taka sær av KT-síðunum, sum verða í blaðnum hvønn hósdag*

Sveinur Tróndarson

Tað er ein almennur loynidómur, at KT-vinnan stendur fyri sera stórum parti av búskaparliga vøkstrinum bæði úti í heimi, men so sanniliga eisini í Føroyum.

Kortini fær henda vinna ikki serliga nógva umtalu í fjølmiðlunum her á landi.

Tað ætlar Sosialurin sær at gera nakað við.

Frá í morgin verður ein nýggjur fastur táttur í hósdagsblaðnum og hevur hann fingið heitið K@T@-Hornið.

Tað verða Steinbjørn í Dali og Finn Jensen, sum fara at vara av hesum tátti, sum kemur at vera í blaðnum hvønn hósdag við fýra síðum hvørja ferð.

### Fjølbroytt tilfar

Endamálið við KT-síðunum í Sosialinum er, sum sagt, at leggja dent á KT-vinnuna og tað, sum har hendir.

Finn Jensen sigur, at tað er ætlanin at tað skal vera seriøst, men kortini ikki so seriøst, at tað bert verður lisið av teimum, sum starvast í vinnuni.

Tí ætla teir sær eisini at leggja dent á at hava okkurt lættari tilfar við eisini.

Sum dømi nevnir hann ein spurnarkassa, har lesararnir sleppa at vera við.

Eisini ætla teir sær við millumbilum, at ummæla eina heimasíðu og tann fyrsta, sum fær viðger er tann hjá Føroya Tele.

### Kronikkur og greinar

Umframt tað hevur Sosialurin eisini fingið samstarv í lag við fólk, sum starvast dagliga við KT og ætlanin er, at tey upp á skift, skulu skriva ein kronikk til KT-síðurnar.

Fyrsta kronikkin skrivar Petur Zachariassen, sum starvast á Fróðskaparsetrinum og sum hevur ein sera stóran kunnleika til KT.

Journalistiskt tilfar verður eisini á KT-síðunum.

Ætlanin er hvørja viku at taka upp eitt evni úr føroysku KT-vinnuni. Her skuldi verið ríkiligt at tikið av, tí tað grør um gangandi fót í føroysku KT-vinnuni.

Tað skal vera sligið fast beinanvegin, at á K@T@-horninum í Sosialinum verður ikki pláss til at viðgera spøl til teldur.

– Hesi verða viðgjørd aðrastaðni, og tí halda vit ikki, at tað er neyðugt, at vit eisini gera tað, sigur Finn Jensen.

– Men tað merkir ikki, at tað bara verður tungt tilfar, tí vit ætla at hava tilfar um KT uttan úr heimi og m. a. fara vit at siga frá, hvussu ein brúkar Internetið, sigur Finn Jensen.

### Kenna vinnuna

Teir báðir, sum Sosialurin hevur fingið at taka sær av KT-síðunum í blaðnum eru tveir, sum so at siga kenna KT-vinnuna innanífrá.

Steinbjørn í Dali hevur starvast í KT-vinnuni í fleiri ár og tí kennur hann vinnuna væl.

Í løtuni starvast hann sum lærari og afturat tí hevur hann eina ráðgevingarfyritøku við síðuna av.

Finn Jensen er eisini lærari sum millum annað undirvísir í KT. Eisini hann hevur sína egnu ráðgevingarfyritøku, sum eins og tann hjá Steinbirni m. a. tekst við KT.

Sosialurin vónar, at lesararnir fara at taka væl undir við nýggja táttinum og hava lesararnir áhuga at senda spurningar til blaðið um KT, sum teir ynskja svaraðar á KT-síðunum, eru tit vælkomin at nýta teldupostadressurnar, sum vera prentaðar undir greinunum.



# Jens skal bjarga flokkinum

Jógvan Hugo Gardar, Oslo



*Stórtingsbygningurin í Oslo*

Lítil ivi er um at Arbeiðaraflokkurin hevur havt stórar trupulleikar við at finna seg til sættis hesi árini, Kjell Magne Bondevik hevur stýrt landinum. Í tí politiska umhvørvinum, bæði uttan fyri og í sjálvum Arbeiðaraflokkinum, hava tey flestu mett, at Thorbjørn Jagland gjørdi tað ógjørligt hjá flokkinum at koma framat maktini aftur í hesum valskeiðnum.

Undan valinum í 1997 kravdi Jagland av veljarunum, at flokkurin skuldi hava minst 36,9 prosent av atkvøðunum fyri at halda fram. Flokkurin fekk ikki 36,9 prosent av atkvøðunum, og Kjell Magne Bondevik bukkaði og takkaði fyri tilboðið, og Jagland fór frá sum forsætisráðharri.

Thorbjørn Jagland hevur fingið nógvar ábreiðslur bæði frá egnum floksfeløgum og mótstøðufólkum. Serliga hevur hann fingið eina harðliga viðgerð í fjølmiðlunum. Hetta fekk so Jagland til í februar at lata upp í hendurnar á Jens Stoltenberg at fáa flokkin aftur til maktina.

Tilboðið takkaði Jens Stoltenberg ikki nei til. Hann hevur bæði meðan Gro Harlem Brundtland og Thorbjørn Jagland hava stýrt flokkinum verið ein tann mest álítandi stuðulin. Hann hevur allatíðina verið teirra stuðul, hóast eygleiðarar meina, at hann ikki hevur líka verið samdur í øllum útspælunum hjá Thorbjørn Jagland.

Jens Stoltenberg fekk skjótt møguleikan at koma framat stjórnarbygninginum, og nú vónar leiðslan í flokkinum, at ein nýggj tíð er komin hjá flokkinum.

## fakta um

## Jens Stoltenberg



Føddur 16. mars 1959, giftur og hevur tvey børn

Studentsprógv í 1978

Útbúgvin búskaparfrøðingur í 1987

Parttíðarblaðmaður á Arbeiderbladet 1979-81

Leiðari í Oslo Arbeiderparti 1990-93

Ráðgevi í Økonomisk analysegruppe SSB 1989-90

Fyrilesari í almannabúskapi á Oslo Universiteti 1989-90

**Nøkur álitisstørv**

Var í fleiri ár í áttatiárunum formaður í AUF (ungmannafelagið hjá norska Arbeiðaraflokkinum)

Limur í floksstjórnini síðan 1985

1. næstformaður í Arbeiðararflokkinum frá 1992

Limur í verjunevnd Stórtingsins 1990-92

Statsskrivari í Umhvørvismálaráðnum 1990-91

Ídnaðar- og orkumálaráðharri í stjórninhjá Gro Harlem Brundtland frá 7/10-93

Fíggjarmálaráðharri í stjórnin hjá Torbjørn Jagland frá 25/10-96 - 17/10-97

Limur í almannanevnd Stórtingsins 1991-93

Formaður í orku- og umhvørvisnevndini síðani heystið 1997

Formaður í tingbólki Arbeiðarafloksins - og harvið forsætismálaráðharraevni floksins frá januar 2000

Forsætisráðharri - helst frá 17. mars 2000

# Kastað saman við arvafíggindunum

*Fyri fyrstu ferð í søguni hava gomlu arvafíggindarnir Høyre og Arbeiðaraflokkurin samstarvað um at fella eina stjórn. Komandi tíðin gerst krevjandi hjá báðum flokkunum*

Jógvan Hugo Gardar, Oslo

Avgerðin um at nú var tíðin komin hjá Jens Stoltenberg, fall í januar, tá flokkurin avgjørdi, at tey skuldu atkvøða fyri einum uppskoti, saman við borgarliga flokinum Høyre, um at byggjast skulu gassorkuverk í Noregi sum økja um CO2-dálkingina við seks prosentum. Noreg hevur skrivað undir uppá at landið komandi árini skal minka um $CO_2$-dálkingina við 23 prosentum.

Hendan undirskriftin í Kyoto-avtaluni er bindandi, og Noreg skal komandi heyst geva boð um, hvussu landið vil koma fram til eina minking uppá 23 prosent.

Við avgerðini í januar broytti Arbeiðaraflokkurin umhvørvispolitikkin hjá sær munandi, og hann er broyttur meir síðani. Frá at samarbeiða við miðflokkarnar hava teir vent sær til Høyre, og stuðla nú eini meir liberalari lóggávu, sum ikki skal seta so strang krøv til dálking.

Fráfarandi stjórnin og teir flestu eygleiðarar meina, at Arbeiðaraflokkurin hevur kastað fyri borð meginpartin av tí álitinum, sum flokkurin hevur havt á umhvørvisøkinum. Serliga var tað kúvendingin bert tímar áðrenn viðgerina av orkufrágreiðingini seinasta hósdag, sum hevur sett spurnartekin við, hvat Arbeiðaraflokkurin meinar. Tá komu boð úr løgmálaráðnum um, at dálkingarlógin mátti broytast fyri, at gassorkuverkini kundu góðkennast. Hetta fekk Stoltenberg til enn einaferð at kasta seg upp í føvningin á Høyre og skjóta upp, at dálkingarlógin skal broytast og tilpassast. Høyre og Arbeiðaraflokkurin vilja broyta lógina fyri at loyva orkuverkunum.

Arbeiðaraflokkurin og miðflokkarnir hava seinnu árini verið samdir um, at dálkingarlóggávan ikki skuldi broytast fyri at lætta um dálkingina. Sjálvur roynir Stoltenberg at siga, at lóggávan verður styrkt, men hesum boðskapinum eru tað ikki nógv sum trúgva uttan fyri Høyre og flokkin á ytsta høgravongi, Framsóknarflokkin.

Fyri fyrstu ferð í søguni hava gomlu arvafíggindarnir Høyre og Arbeiðaraflokkurin samstarvað um at fella eina stjórn. Komandi tíðin gerst krevjandi hjá báðum flokkunum.

Hjá Høyre er trupulleikin grunnleggjandi, og flokkurin hevur stórar trupulleikar við at greiða sínum veljarum frá, hví teir hava slept Arbeiðaraflokkinum til valdið aftur.



*Thorbjørn Jagland, fyrrverandi forsætisráðharri, verður helst nýggju uttanríkisráðharri*

# Áliti má fáast aftur

*Roknað verður við, at norðmenn skjótt aftur vilja royna at koma inn í ES. Her hevur Jens Stoltenberg enn ein møguleika at fara uppí part við Høyre og Framsóknarflokkin. Miðflokkarnir og Sosialistiski Vinstriflokkurin eru allir ímóti ES-limaskapi*

Jógvan Hugo Gardar, Oslo

Hjá Jens Stoltenberg er tað av stórum týdningi at vinna aftur tað álitið, sum hvarv við atkvøðugreiðsluni seinast hósdag. Umhvørvisfelagsskapirnir eru í øðini inn á Arbeiðaraflokkin, og innanhýsis í flokkinum eru fólk sera misnøgd við, at gassorkuverkini skuldu fáa flokkin í stjórn.

Fredric Hauge, sum er maðurin aftan fyri umhvørvisfelagsskapin Bellona, er í øðini inn á Arbeiðaraflokkin, og hann himprast ikki við at siga, at Jens Stoltenberg fer at stinka av gassi restina av tíðini sum politikari.

Fyri Jens Stoltenberg er tað ikki akkurát tað besta skoðsmálið at fáa. Fredric Hauge var tann, sum í síni tíð fekk ungdómspolitikaran og AUF-formannin, Jens Stoltenberg, til at seta seg gjølla inn í umhvørvisspurningar. Teir eru ikki akkurát bestu vinmenn í løtuni.

Veljarakanningar seinastu dagarnar vísa eisini, at gassorkumálið ikki er tað, sum vinnir veljarar fyri Arbeiðaraflokkin. Í gjáramorgunin kom ein kanning, sum vísti, at Arbeiðaraflokkurin hevur mist millum tvey og trý prosent av veljarunum seinastu vikurnar, meðan fráfarandi stjórnarflokkarnir, og serliga Kristiligi Fólkaflokkurin eru styrktir munandi. Hesir hava fingið nærri seks prosent fleiri veljarar. Eisini kanningar um, hvussu væl dámdir teir báðir Kjell Magne Bondevik og Jens Stoltenberg eru, vísa, at Stoltenberg tapir. Frá at vera munandi betri umtóktur enn Bondevik, er tað nú Kjell Magne Bondevik, sum flest norðmenn meina er best egnaður til at stýra landinum.

### Fríggjadagurin avgerandi

Fríggjamorgunin hevur Jens Stoltenberg sína fyrstu stjórn klára, og spenningurin er stórur.

Thorbjørn Jagland fær ein ráðharrasess, og hetta gerst eftir øllum at døma uttanríkismálaráðið. Annars so verður spennandi at síggja, hvønn hann setir sum umhvørvismálaráðharra. Hesin sessurin hevur stóran týdning fyri flokkin, um álitið millum veljarar, sum seta umhvørvismál høgt, skal vinnast aftur.

Onnur nøvn sum eru nevnd eru fólk sum Jens Stoltenberg hevur havt tætt samband við og annars teir, sum hava staðið á odda fyri ungdómsfylkingini hjá Arbeiðaraflokkinum, AUF. Her verður serliga Trond Giske nevndur. Hann er bæði ímóti gassorkuverkunum og móti norskum ES-limaskapi.

Jens Stoltenberg hevur boðað frá, at ES-spurningar skulu seta meir í andglettin nú. Roknað verður við, at norðmenn skjótt aftur vilja royna at koma inn í ES. Her hevur Jens Stoltenberg enn ein møguleika at fara uppí part við Høyre og Framsóknarflokkin. Miðflokkarnir og Sosialistiski Vinstriflokkurin eru allir ímóti ES-limaskapi.